# Krevur treytaleysa umbering

*Høgni Hoydal krevur í opnum brævi, at Jóannes Eidesgaard gevur Føroya fólki treytaleysa umbering fyri framferð sína, tá landsstýrið vendi sær til ST fyri at fáa triðja part upp í fullveldissamráðingarnar*

John Johannessen

– Tað hevði sømt seg, at Jóannes Eidesgaard nú gevur Føroya fólki eina treytaleysa umbering fyri framferðina í ST-málinum. Hartil átti hann sum fólkatingsmaður at sett fyrispurning til donsku stjórnina, um hon viðurkennir Føroyar sum tjóð.

Soleiðis byrjar opna brævið, Høgni Hoydal hevur sent Jóannesi Eidesgaard.

Brævið hevur Høgni Hoydal skrivað, eftir at ein frágreiðing frá íslendska serfrøðinginum í altjóðarætti, Gudmundi Alfredsson, varð almannakunngjørd í vikuni.

Í hesi frágreiðing, sum landsstýrið hevur biðið um, staðfestir Gudmundur Alfredsson, at danska stjórnin, tá hon fór undir samráðingar við føroyingar um loysing, á ósagdan hátt hevur viðurkent, at Føroyar eru tjóð, sum hevur sjálvsavgerðarrætt.

Tí vil Høgni Hoydal hava eina umbering frá Jóannesi Eidesgaard fyri millum annað at hava sagt, at landsstýrið setti fólkaræðið til viks, tá tað vendi sær til ST við fyrispurnigni um møguleikan at fáa triðja part upp í fullveldissamráðingarnar. Sosialurin hevur biðið Jóannes Eidesgaard um eina viðmerking til brævið frá Høgna Hoydal. Men Jóannes Eidesgaard sigur, at hann ikki fer at gera nakra viðmerking til málið, fyrr enn hann sjálvur hevur skrivað eitt opið svar til Høgna Hoydal.

– Eg frætti um brævið í útvapstíðindunum í mánakvøldið og fekk tað sendandi við telduposti seint sama kvøld, so eg havi enn ikki havt stundir at skriva Høgna eitt svar. Men svar skal hann fáa, sigur Jóannes Eidesgaard.



*Jóannes Eidesgaard*

# Leggja fullveldisætlanina um

*Landsstýrið arbeiðir í løtuni við einum nýggjum samráðingaruppleggi, ið skal fáa undirtøku millum føroyska fólkið og møguliga eisini frá einum parti av føroysku andstøðuni*

John Johannessen

Í gjár og fyrradagin hevði landsstýrissamgongan fund um uppleggið, sum skal leggjast fyri donsku stjórnina á samráðingarfundinum um føroyskt fullveldi, sum verður í danska forsætisráðnum 26. oktober.

Hóast samráðingaruppleggið enn ikki er heilt liðugt, er greitt, at talan verður um eitt upplegg, sum verður nógv ørðvísi enn tey, ið eru brúkt á teimum trimum undanfarnu samráðingunum.

Sosialurin hevur tosað við fleiri keldur í Tinganesi, sum vátta, at arbeitt verður við einum samráðingaruppleggi, ið inniber, at arbeitt verður stig fyri stig fram móti fullveldinum.

Landsstýrið fer at arbeiða við at fáa evsta vald til løgtingið eftir eini mannagongd, ið líkist sjálvstýrisuppskotinum hjá Javnaðarflokkinum. Blokkstuðulin skal trappast niður, so skjótt sum føroyingar meta tað verða ráðiligt, og tá blokkstuðulin er burtur, hava vit føroyskt fullveldi.

Hvussu umsitingarliga samstarvið við Danmark skal skipast, hevur tað ikki borið til hjá okkum at fáa at vita.



### Ikki endaliga samdir

Fyrradagin hevði landsstýrið fund um hesa ætlan, sum Fólkaflokkurin stendur fyri og tískil tekur undir við.

Á hesum fundinum eydnaðist tað ikki endaliga samgonguni at semjast um ætlanina, men Sosialurin skilir tó, at lands-stýrismaðurin í sjálvstýrismálum, Høgni Hoydal, ásannar, at neyðugt er við eini líknandi ætlan, um landsstýrið skal røkka málinum, ið er at seta á stovn fullveldið Føroyar.

Men kortini eru enn trupulleikar við hesi ætlan. Hesir trupulleikar liggja hjá Tjóðveldisflokkinum, har partar av flokkinum ikki vilja góðtaka, at Høgni Hoydal fer frá upprunaliga fullveldisuppleggínum til eitt annað uppskot, ið er nógv tamari.

### Samgongufund um málið

Klokkan tvey í gjár, beint eftir at Sosialurin fór til prentingar, var samgongufundur í Tinganesi um uppleggið. Á hesum fundi varð roknað við, at stór ósemja fór at verða um uppleggið. Men keldurnar úr Tinganesi rokna kortini ikki við, at samgongan er í vanda. Tvørturímóti verður roknað við, at fullveldismálið nú fer at verða loyst.



# Nýggj ríðihøll við Oyggjarvegin

*Felagið Berg Hestar í Havn byggir nýtt rossafjós og ríðihøll við Oyggjarvegin*

Edvard Joensen

**Tórshavn:** Felagið Berg Hestar hjá Leif Berg í Havn er farið undir at grava út fyri nýggjum fjósi og ríðihøll í Flatnahaga vestan fyri Hotel Føroyar við Oyggjarvegin.

Leif Berg sigur, at høllin, sum bygd verður, verður 33 ferðir 24 metrar til støddar. Høllin verður flutt inn úr Svøríki, haðani hon verður latin í viku 50. Ætlanin er, at bygningurin skal standa klárur í februar-mars komandi ár. Høllin er gjørd soleiðis, at tað er lætt at byggja hana út, um tørvur skuldi verðið á tí. Og plássið rundan um er gott, so har er eingin forðing mótvegis tí, sum er í Marknagili, har Berg Hestar halda til í dag.

Høllin fer at verða brúkt til ríðing fyri brekað. Hendan ríðingin fer sum er fram á økinum við Marknagilsvegin, har Berg Hesta nú halda til. Men tá høllin verður liðug, fer at bera til at hava ríðingina undir taki, og tað er sjálvandi nógv betri.

Leif Berg greiðir frá, at hendan ríðingin byrjaði í 1990 sum eitt frítíðarítriv. Hann byrjaði tá saman við einum fysioterapeuti. Í dag eru tað umleið 30 fólk, sum regluliga brúka hetta tilboðið. Tey fáa ávísing frá lækna og játtan frá Almannastovuni. Hvønn mikudag verður farið til Runavíkar, har riðið verður á fótbóltsvøllinum, sigur Leif Berg. Eini fimm ross verða vanliga brúkt til hesa ríðingina.



Bygningurin, sum bygdur verður við Oyggjarvegin, er umframt sjálva høllini eisini eitt fjós, sum fer at hýsa 33 rossum. Í dag hevur felagið 20 ross. Men fleiri eru, sum hava biðið um pláss fyri egnum rossum, so flotin fer at vaksa munandi, sigur Leif Berg.

Tað er soleiðis, at økið, sum bygningurin fer at standa á, er leigað frá Tórshavnar Kommunu í 15 ár. Ymsar umstøður gera, at ikki ber til at leiga básarnar út. Tí er avgjørt at hækka partapeningin í felagnum. Soleiðis koma nýggir eigarar í felagið og fáa á tann hátt síni ross í fjósið.

Aftrat fjósinum og høllini verður eisini ein bjálkabygningur til ferðafólk bygdur.

Leif Berg sigur, at tey hava seinnu árini rættiliga fingið bygt upp eina vinnu við ríðitúrum. Byrjað varð við hesum túrunum í 1993, og fyrstu árini vóru tað bara útlendingar, sum fóru túrarnar. Men seinastu tvey árini hava tað verið fleiri føroyingar enn útlendingar, sigur hann.

Bygningurin við Oyggjarvegin er projekteraður til 2,3 milliónir krónur. Men Leif Berg sigur, at har eru so nógv, sum á ein ella annan hátt taka eina hond í, at hann væntar, at tað kann gerast munandi bíligari.


